## Á botn í ár

Íslendski fíggjarmálaráðharrin, Steingrímur J. Sigfússon (myndin), segði um vikuskiftið, at búskaparkreppan í Íslandi kemur niður á botn seinni í hesum árinum, og at so fer at ganga hinvegin. Hann ásannaði, at arbeiðsloysið er søguliga stórt, og at tað helst verður størri, enn metingar hava sagt. Fleiri hava fýlst á, at stjórnin hevur ikki gjørt nóg mikið fyri arbeiðsmarknaðin, men Jóhanna Sigurðardóttir, forsætisráðharri, hevur sagt, at tað er neyðugt at fáa eina semju um Icesave-skuldina, áðrenn stjórnin kann fremja átøk, ið skulu fáa ferð á búskapin.



## SF ein frammaná

Teir seinastu mánaðirnar hevur tað gingið sum eftir ánni hjá Sosialistiska Fólkaflokkinum í Danmark, men nú tykist vend vera komin í. Í februar vísti ein meiningakanning, at flokkurin hevði fingið 18,1 peosent, um fólkatingsval var tá, men um vikuskiftið vísti ein nýggj kanning, at nú hevði flokkurin fingið bara 15,5 prosent av atkvøðunum. Úrslitið er kortini væl betur enn tey 13 prosentini, sum SF fekk á valinum í 2007. Hóast afturgongdina hjá SF hevði andstøðan fingið meiriluta í Fólkatinginum, um val var nú. Men tað hevði bara verið ein tingmaður á muni.

## Flogvøllurin í Vágum ein stór hóttan

**Byggja vit flogvøllin í Vágum út, fer tað at útseta eina varandi loysn eini 25-35 ár, heldur Poul Michelsen úr Fólkaflokkinum**

FLOGVØLLURIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Størsta hóttanin ímóti føroyska samfelagnum í framtíðini er at byggja flogvøllin í Vágum út.

So bersøgin var Poul Michelsen, tingmaður fyri Fólkaflokkin, tá ið Løgtingið nú ein dagin viðgjørdi ætlanina at byggja vøllin í Vágum út.

Hann ivast nevniliga ikki í, at verður vøllurin í Vágum bygdur út, fer tað at útseta eina varandi loysn í 25-35 ár.

- Eg unni ikki mínum eftirkomarum eina so vánaliga loysn, legði hann afturat.

Hann sipar til, at hann sær ein framtíðar flogvøll, sum eina fortreyt fyri at menna samfelagið og fyri at menna vinnuna og útflutningsvinnuna.

Hann segði, at hann hevði ein lista yvir flogfør, sum kunnu lenda á einum útbygdum flogvølli í Vágum.

- Men tað er onki av hesum flogførum, sum kann brúka vøllin í Vágum uttan avmarkingar og tí kann íløgan ikki optimerast.

Hann gjørdi kortini greitt, at hann fer at atkvøða fyri útbyggingini.

Men hann vil samstundis hava tingið at semjast um at fáa eina óhefta kanning av einum framtíðar flogvølli so at tann ætlanin ikki skal detta niðurfyri.

# Broytt meining um flogvøllin í Vágum síðani á jólum

**Fyri jól helt politiski formaðurin í Javnaðarflokkinum, at avgerð skuldi ikki takast um at byggja flogvøllin í Vágum út, fyrrenn úrslitið er komið av kanningin um, hvar í Føroyum tað er best at gera ein flogvøll. Men tað sjónarmiðið hevur hann ikki longur**

FLOGVØLLURIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Sum støðan er nú, er onki annað at gera.

John Johannessen, politiskur formaður í Javnaðarflokkinum, hevur broytt meining um ætlanin at útbyggja flogvøllin í Vágum.

Fyri jól helt hann, at støða eigur ikki at verða tikin til útbyggingina, fyrrenn úrslitið er greitt av eini kanning sum vísir, hvar í landinum tað er best at leggja ein framtíðar flogvøll.

Tann kanningin verður liðug so mikið skjótt, at hóast Løgtingið fer at samtykkja útbyggingina í Vágum endaliga í morgin, eru gravkýrnar neyvan farnar ígongd, áðrenn úrslitið fyriliggur um, hvar í landinum ein flogvøllur liggur best.

### Útsetur ein framtíðar flogvøll

Fyri Jól helt John Johannessen, at tað var skeivt at útbyggja flogvøllin í Vágum fyri 400 milliónir, fyrrenn vit vita við vissu, at tað er har, at ein framtíðar flogvøllu liggur best.

- Byggja vit flogvøllin í Vágum út til fulnar, kunnu vit gloyma alt um ein annan vøll tey næstu 40 árini, hóast kanningin skuldi komið til tað úrslit, at okkurt annað stað í Føroyum er betri hóskandi at gera flogvøll á, segði politiski formaðurin í Javnaðarflokkinum fyri jól.

Men nú heldur hann, at tað er rætt at byggjavøllin í Vágum út.

Hann vísir á, at vinnunevndin hjá Løgtinginum hevur viðgjørt útbyggingina út í æsir og har hava tey eisini tikið atlit til tey ivamál um framtíðarflogvøllin, sum hann sjálvur hevur havt.

Og ein samd vinnunevnd heldur, at flogvøllurin í Vágum skal byggjast út.

Harumframt er útbyggingin blivin nógv bíligari enn væntað og tað er eitt orsøk afturat til, at tað er vert at taka av.

### Stúrir framvegis

Men hann stúrir framvegis fyri, at hetta fer at kvala alt tos um ein framtíðarflogvøll í Føroyum tey næstu 40 árini.

Tvístøðan, vit standa í, er at byggja vøllin í Vágum út, ella um vit skulu bíða í nógv harrans ár eftir einum nútímans flogvølli, sum støðan í samfelagnum er nú.

Hann vísir á, at undir øllum umstøðum tekur tað fleiri ár at fyrireika ein nýggjan flogvøll.

Hann heldur framvegis, at tað er bæði keðiligt at taka taka avgerð um at byggja flogvøllin í Vágum út áðrenn úrslitið av hinari kanningini fyriliggur.

Hann heldur enntá, at tað er undarligt at Løgtingið ikki kann bíða eftir úrslitinum.

Men hann heldur ikki, at tað er nakar vegur aftur, sum støðan er nú.

Hann vónar bara ikki, at hetta fer at skjóta ein framtíðar flogvøll alt ov langt fram í tíðina.



*Í morgin fer Løgtingið at samtykkja ætlanina at bygjaflogvøllin í Vágum út og eisini tinglimir, sum eru ógvuliga ivingarsamir, fara at atkvøða fyri*